# SEYÐOYGGJASØGA

*Skriva av Fagner úr Vínlondum*

Bygt á tær elstu skriftirnar og tað eldri søgukøn fólk sum, Kenneth Jürgen Hans av Krónuheimið (af Kronheim), Sára úr Belfourt (Sarah af Belfourt), Vladomar Pandomark av Kaiserhúsið (af Kaiserhuis) og onnur hava greitt frá og skriva fyri nøkrum øldum síðani

## Formæli

Hetta er ein frásøgn sum mín eldri starvsfelagi Heikki av Kongshúsum hevur greitt mær ífrá. Hann doyði fyri sekstan árum síðani hundra og sjey ára gamal. Henda frásøgn var ongantíð niðurskriva og tí vildi eg nú stundir vóru til tess, hetta gera. Heikki hoyrdi hesa søgu frá einari vísari gamlari kvinnu sum æt Klara von Saarlandbier, og hon aftur frá øðrum sum nú eru gloymd. Heilt aftur frá hesum gomlu tíðum, ja heilar tjúgu og tríggjar øldir aftur hevur søgan verði søgd, fyrst av Sarah af Belfourt, ella á okkara máli Sára úr Belfourt. Hon vitjaði fyri nógvum øldum síðani tey vísastu av teimum øllum og fekk har hoyrt ymsar søgur, millum annað hesa um Seyðoyggjarnar, sum eisini er tann einasta sum hevur yvirliva tíðarinnar tonn. Seyðoyggjarnar hvurvu fyri eini tjúgu øldum síðani tá eitt av teimum endaleysu kríggjunum gjørdi enda á teimum. Tað vóru teir sonevndu ruskararnir sum tveittu eini hálvthundra av sjálvstýrdum tonsum av atomrakettum yvir oyggjarnar.

Aftan á hesa frásøgn kemur eitt kvæði ella ein yrking sum er so gomul at eingin veit hvør ið hevur yrkt. Heitið er Heimssvar, og her meinast sikkurt við at heimurin svarar aftur. Hettar er um nakað av tí sama sum vit hoyra í endanum av frásøgnini um Seyðoyggjarnar, men um tað er ein samanhangur er ringt at siga.

Her kemur frásøgnin um Seyðoyggjarnar.

Hesar hendingar fóru fram fyri so langari tíð síðani at onki livandi vesin minnist tær. Tað hendi áðrenn teir nýggju heimspartarnir komu til, og áðrenn tey fyrstu Anarkistisku Paradísini gjørdu av við Kapitalin. Áðrenn frálíku stormarnar og tann stóra Deyðan.

Tað var tá Sára úr Belfourt fór víða um lond fyri at kunna seg um tíðindi og annan fróðskap. Hon gekk nú, og hitti eldri mann, ið nevndi seg Símun von Glösingen. Hann spurdi hana um hon hevði hoyrt um Seyðoyggjarnar? Tað hevði hon ikki. Hann bað hana síðani ganga norðureftir til ikki komst longur.

Nú gekk Sára úr Belfourt til hon kom til ein grótvegg. Her slapst ikki longur, men brádliga opnast veggurin, og áðrenn hon veit av er hon inni í berginum. Nú sita fýra fólk yvir av henni og siga við ein munn: ”Tú ert heldur sein!” Tey søgdu síðani síni nøvn: Artin Uther, Kona Askdóttir, Fridheim von Grosshaus og Anna Stifinder. Sára spyr nú: ”Hvussu er við tíðindum úr heiminum? ”

Kona Askdóttir sigur: ”Vit vita tað sum er vert at vita, men um tú ikki veist um Seyðoyggjarnar kanst tú fáa ymiskt um hesa søk at hoyra. ”

”Tað vil eg fegin hoyra um”

Nú tosaði Artin Uther: ”Tað var í forðum tá hesar oyggjar vóru skaptar. Tað komu svín svimjandi úr eysturi og fuglar komu flúgvandi úr suðuri. Hesi blivu til nítjan smáðar oyggjar og burtur úr teimum deyðu svínunum og fuglunum, kom seyður í hópa tali. Síðani komu fólk úr eysturi og suðuri, og skjótt vaks fjøldin. Tær fyrstu øldirnar eru ikki beinleiðis spennandi, so vit vilja siga ífrá tá fólk høvdu búð har í fjúrtan øldir. ”

”Hvat hendi tá? ” spurdi Sára og fekk til svar frá Artin Uther: ”Tað var ein tíð tá tað mesta snúði seg um vøkstur[1]. Tá var tað eisini eitt mark ímillum menniskju og heimin; nátúr og mentan var tað tey kallaðu tað. Menniskja var hevja yvir sjálvan heimin, men hetta er nakað sum gekk aftur alla stanði tá á døgum. Menniskja hevði tað vit kunnu kalla stórlætisørskap. Men vit skulu nú siga tær frá um oyggjarnar. ”

Nú var tað Fridheim von Grosshaus sum førdi orðið: ”Tá á døgum gekk alt út uppá pengar, sum vit hava hoyrt. Men tað var líka so viktugt at trúgva og biðja til gudarnar. Hesir vóru allir mannfólk tí tá vóru kvinnur ikki so høgt í metum, at samanbera við børn. Tann størsti æt Mammon, sonur hans æt Kapitalur og so var tað Tann heilagi Vøksturin. Hesir vóru ikki av hesum heimið, hóast Kapitalur skal hava gingið her í eini tríati ár, nógvar øldir áðrenn henda frásøgn var til. Teir høvdu serliga nógv viðhaldsfólk í Seyðoyggjunum.

”Hvussu var við teimum lærdu? ” Tá mælti Anna Stifinder: ”Hetta vóru mest menn í hvítari ella ljóst bláari skjúrtu, summar tíðir í øðrum litum, og við slipsi[2]. Hesir skuldu verða ríkir og sum oftast vera trúgvandi, tó hetta ikki var krav[3]. Hesir ásettu nú lógir, hóast eitt sonevnt ting var til tað sama. Men hesi tingfólk vóru antin ikki rík og trúgvandi, og tá blivu tey ikki hoyrd ella bara ignorera, ella tey vóru stýrd av teim Lærdu. Eisini kundi tað vera at ein av teimum Lærdu sat í tinginum.

”Hvussu bar tað til at menniskja var hevja yvir heimin? Tað ljóðar heilt ótrúligt! ” Ja tað var heilt ótrúligt” svaraði Kona, ”men tey vóru ikki hevjaði yvir heimin, tað var bara nakað tey trúðu. Tað at eiga nakað var tað viktigasta. Tað kundi verða hvat sum helst, djór, alskyns ting og tól, helst skermar, og enntá land![4] Meir man átti hægri var man í metum. Man skuldi arbeiða so nógv sum man kundi, tí so fekk man meira pengar og so kom man hægri á Tann av Gudunum givna Gullstiðjan. Hetta var hægsta mál í lívinum hjá teim flestu, um ikki var man at meta sum dovin ella letibúkur. Tí var tað at øll slitu seg upp, at hvíla var ein synd. ”

---

[1] Ikki sum vøkstur í okkara merking sum t.d. trævøkstur ella grasvøkstur. Her er merkingin vøkstur í gulli ella ríkidømi

[2] Klædnaplagg sum ikki verður brúkt longur. Eitt toystykki sum hekk um hálsin og niður á bringuna

[3] Tað var tó krav at vera væl við onkran trúgvandi

[4] Milum annað seldi man allar oyggjar so at fremmanda fólk kundu síggja tær. Tað vil siga at Seyðoyggjafólki sá sítt land sum eina vøru man kundi vinna pengar burtur úr. Men tey sóu ikki at tey oyðiløgdu landi

Og Artin tók yvir og helt áfram: ”Eg vil enntá siga at, tað at arbeiða var átrúnaður. Tað vóru tey ið als ikki trúðu á hesar gudar, men sum arbeiddu sum oksar. Fyri hvat kanst tú spyrja. Tað var fyri at passa inn, fyri at fáa fleiri pengar so man kundi keypa meir av óbrukuligum tingum[5]. Og fyri at halda framgongdini koyrandi[6].

”Men nú vil eg hoyra eitt sindur um hvussu hesar oyggjarnar sóu út og hvussu veðri var har”

Kona svaraði: ”Tað var ikki beinleiðis veðurgott. Tað var hvørki vetur, ei summar, men bara eitt langt vár og eitt langt heyst. Tað vóru einstakir summardagar og vetrardagar, men onki at tosa um. Oyggjarnar vóru høgar og veðurbardar. Trø vuksu um tey vóru væl hegnaði av, frá seyðinum. Annars var tað bara gras. Í gjáum og støðum, har seyður ikki slapp framat vuksu arðar plantur, sum vístu hvussu tað sá út áðrenn seyðurin kom upp úr jørðini.

Har vóru bjørg og djúpir dalar, summa staðni var ógvuliga flatt. Fólk búðu í størri og smærri búðplássum fram við strondina. Ímillum búðplássini var vegur; um ov høgt var sprongdi man seg ígjøgnum fjall, um sund var, sprongdi man seg undir sundi so koyrandi var í allar oyggjar. Ja hvørt búðpláss hevði sín egna tunnil.

”Tað ljóðar ikki sum at tað var lætt, ikki at vera menniskja har, hvussu var við øllum øðrum livandi? ”

Artin mælti: ”Áir vóru tómdar so at fabrikkir og vanlig fólk kundu liva[7]. Soleiðis hvurvu ymisk djór. Havið var illa dálka og og tað var púra opinlýst hvar alt kom frá, men tað gingu teir lærdu ikki so høgt uppí. Teir hugdu mest at grafum og óskiljandi tølum sum alla tíðina skuldu upp. Viðhvørt gekk tað gali, men fólk gloymdu skjótt. Tey vóru doyvd av heilasmølum undirhaldi sum var skapt til tað sama. Henda høvdu tey tilgongd til alla tíðina ígjøgnum teir skermar sum tey gingu við bæði nátt og dag[8]. Soleiðis kundu tey høgu hava tamarhald á tí niðurdoyvdu fjøldini. ”

”Hetta ljóðar sum hin versti marrudreymurin, hvussu kom broyting í, ella broyttist nakað”

Fridheim savaraði: ”Tað skuldi nógv til áðrenn nakað hendi. Men heimurin svaraði aftur ímóti teimum óhjálpiligu menniskjunum, sum alla virðing høvdu mist fyri øðrum livandi. Veðurlagi gjørdist verri, men tað var ikki nokk. Tá var tað at ein av størstu víngudunum, nevndur Rom, sendi ein av høvuðseinglum sínum upp á fold. Hetta var erkaeingilin Corona sum gjørdi ein drykk við sama navni eitraðan. Hetta smittaði sum pestin og nógv doyðu. Nú bóru teir Lærdu seg skjótt at, tí tað stóð um mannalív. Men einamest vóru teir óttafullir um vøksturin. Teir lærdu tosaðu bara um at fáa vøksturin í gongd aftur og Ting, ikki bara í Seyðoyggjum, men um allan heim sprændu gull í fyritøkur, sum púra opinlýst vóru alt oyðileggjandi fyri luft, land og hav.

”Tað má hava veri sterkt doyvingarevni, hesir skermarnir! ”

---

[5] Tá var t.d. ikki loyvt at rúsa seg við natúrligum rúsevnum, men tað var loyvt at rúsa seg við at keypa ting man ikki hevði brúk fyri. Orsøkin er einføld: at rúsa seg natúrliga, førir við sær at man arbeiðir minni og tað er ikki gott fyri vøksturin. At keypa ting man ikki hevur brúk fyri var hinvegin av tí góða, tí tað var gott fyri vøksturin. Um vøkstur,sí notu eitt.

[6] Framgongd merkir her nakað tað sama sum vøkstur. Tað var viktugt alla tíðina at hava meir, tí um man ikki hevði meir, hevði man minni. Í dag er hetta heilt óskiljandi, men tað gekk man høgt uppí í hesum tíðum

[7] ”Áir vóru tómdar so at fabrikkir og vanlig fólk kundu liva”; Flestu fabrikkir brúktu ikki so líti av vatni. Men flestu tól sum man ikki hevði brúk fyri, skuldu brúka streym. Henda fekk man úr vatni í áum. Soleiðis vóru livistøð fyri bæði plantur og djór oyðiløgd. Men tað viktigasta var at menniskja hevði tað gott, og tað var eingin vinnigur av smáum kyktum og plantum ongin sá. Altso var alt sum ikki var gott fyri vøksturin óbrukiligt.

[8] Skermarnir vóru skaptir av ”kreativum” fólkum. Tað vil siga at skermarnir vóru brúktir sum doyvingarevni ímóti uppreistri. Men ikki minst kundu hesi fólk altíð síggja hvar tú vart, hvat tær dámdi, hoyra hvat tú segði, ja alt sum tú gjørdi

”Ja tað er vist” segði Anna, ”Tey sóu væl at okkurt var gali, men tá vóru tey bangin fyri at øll onnur fóru at kalla tey aktivistar[9], og tað var ikki tað besta heitið at fáa.

Men heimurin svaraði aftur og tá komu tað stormar sum vit í dag ikki kunnu ímynda okkum og sjúkir, at líkna við tað yvir nevndu vóru úti um seg alt oftari. Tað kom turkur og tað kom regn og tað kom vindur. Brádliga vóru tað so nógv støð í heiminum sum vóru ólivilig at fólk rýmdu. Nú sakk allur vøkstur saman og øll mistu síni heilagu arbeiði. So bleiv tað kríggj har fólk sum kendu hvønn annan bardust, familjur drupu hvønn annan, alt av berari neyð. Tað vóru bara tey sum stóðu fast ímóti tí heilagu tankagongdini um vøkstur og skermar sum kláraðu tað. Hesi settu síðani á stovn tey fyrstu Anarkistisku[10] paradísini, sum tú Sára úr Belfourt ert eftirkomari eftir. Og nú hevur tú fingið so nógv at vita um hesa heiladeygu tíð sum vit kunnu siga tær ífrá. Nú skalt tú fara heim aftur og siga øllum sum tú møtir á tínum veg, um tað vit hava sagt tær. Vit mugu ongantíð, nakrantíð koma í eina slíka støðu aftur”

Nú hoyrdist bæði buldur og brak, og nógvur roykur var í luftini. Tá Sára sá um seg stó hon á berari grasfløtu og tey fýra og grótveggurin vóru burtur. Hon gekk nú heim og segði hesa frásøgn til øll sum hon møtti á sínum veg. Her endar frásøgnin um Seyðoyggjasøgu.

# Heimssvar

1. Fólk høvdu góðar dagar
   Arbeiddu og hugdu
   í teldlar og teldur
   flugu til útheim og silgdu so langt
   Skorsteinar leiða
   svartan royk í rúmd

2. Alt kundi keypast
   Fyri gjøgnumskygdar pengar
   Brúksøld
   Ongantíð keypmaður var tómur
   Sól man fekk í tólv mánaðir
   um tað var tað man vildi

[9] Í Seyðoyggjum merkti orðið aktivist tað sama sum terrorist
[10] Anarkist var eins og aktivist at meta sum terrorist

Onki var óført
Øll høvdu alt

3. Sótu gudar í høllum fullar av víni
kjakast hvussu lagnan hjá menniskjum
skal vera
Segði Rom
fullur sum ein pávi
menniskja tekur
okkum frá valdi

4. Hetta skal steðgast
við ógvusligum
tiltøkum
so at tey
tað aldrin gloyma

5. Síðan blivu fólk sjúk
og landamørk stongdu
bussar vóru tómir
Flogfør á asfalti liggja
og skip í høvnum

6. Nú brustu grafar
Skaptir av spekulantum
sannir Vargar í
Lambaskinni eru
Mammon bleiv burtur
og Kapitalur flýggjar
Tann heilagi Vøksturin
Fer uppí royk
Vargar
hoyngja seg í síni slips

7. Nú skelvir heimur
og sólin brennur
óliviligt er hjá fólkun
og djórum
og plantum
havið kókar
og vøtn turka

8. Land í hav søkkur
annað klovnar
landamørk brotna
fólk í longum røðum
í lond ganga
oyggjar og fastland brenna
krígsøld, drápsøld!
maður drepur mann
Og børn eta røð
matmangul, vatnmangul

9. í norði er grimdarregn
í Suðuri og eystri er turkur
í vestri er mikil stormur
Blábjørg brotna
og skógur brennur
Vindtíð og stormøld
Ikki er livandi

11. Detta stjørnur niður
Í kolasvart hav
Heimur er vreiður
Sólin fer í kav
Menniskju falla
Og onnur gráta
Kunnu ei hugsa
Ongan skerm at spyrja

12. Ongir býir
eru uttan lík
Ravnstíð, Vargstíð!
Ilt er í menniskjum
Enn hvønn annan drepa
Við bumbum og byrsum
Knívum og hondum
Ganga fólk í langum røðum
Yvir um áir
og uppum fjøll

13. Heimur svarar
Við øllum sínum veldi
Ikki eitt land
kann standa ímóti
Regn, heglingur
Onki kann grógva
Sól og eldur alt oyðileggja
Pengar og tøl
líti duga
í slíkum tíðum
tey kunnu ikki etast

14. Kom nú ein tíð

tá Jørðin lá í knúsi
Sólin var ei svørt
og land var grønt
aftur kundi grógva
Nýtíð, góðtíð!